
- Ongin samstarvsavtala upp á tvørs um samanhangandi viðgerð og umsorgan er ímillum tey ymsu økini innan heilsuverkið, sigur Mary J. í Garði, stjóri í Nærverkinum

Savnsmynd: Jens Kristian Vang

*Framhald av s. 19*

av tørvi til varandi sjúk ella doyggjandi sjúklingar, sigur nærverksstjórin.

Hon vísir á, at kabbameinssjúkingar, sum ynskja at vera heima seinastu tíðina, altíð hava høga raðfesting og verður øll hjálp sett inn, ið er neyðug. Bæði praktiskt og røktarfakliga, so at bæði sjúklingur og alt húskið kann fáa hjálp.

- Hesir sjúklingar fáa eisini mangan ein opnan innleggingarseðil til deildina á sjúkrahúsinum, so teir kunnu leggjast inn beinleiðis á deildina, um tørvur gerst á tí, sigur Mary J. í Garði.

## Kommunulæknin stendur í vegin

Heimadeyði krevur serkunnleika og samstarv millum sjúkrahús og heimatænastu. Um varandi sjúk ella doyggjandi ynskja at doyggja heima, er heimatænsatan ikki klár til hesa uppgávu. Tað krevst fyrst og fremst serkunnleiki við góðari útbúgving til hetta økið. Í Suðurstreymoy hevur heimatænastan ein sjúkrarøktarfrøðing, ið hevur serliga onkologiska (krabbameinsfrøði) eftirútbúgving, og ein av hennara uppgávum er at undirvísa starvsfólkinum í røkt av doyggjandi sjúklingum.

Tá tosað verður um hugburðin rundan um eitt palliativt (linnandi) toymi sum tað á Landssjúkrahúsinum, vísur Mary J. í Garði á, at rættast hevði verið, at heimatænastan fekk møguleika at samstarva við toymið uttan at skula nýta kommunulækna sum millumlið.

- Kommunulæknin kann í hesum førinum seinka um hjálpina til sjúklingin. Fyri tað fyrsta er kommunulæknaskipanin sjálv sperd og manglar oftani læknar. Fyri tað næsta eigur at vera møguligt at fáa samband við palliativa toymið alt samdøgrið og hvønn dag í vikuni, sigur Mari J. í Garði.

Í dag verða trupulleikarnar loystir mál fyri mál, og hesin háttur at arbeiða eftir førir ikki langt inn í framtíðina, heldur nærverksstjórin.

- Rákið sær út til at vera, at í framtíðini fara fleiri og fleiri uppgávur at skula røkjast uttanfyri sjúkrahúsini. Til tess at tryggja, at hesar uppgávur koma at liggja væl, mugu vit finna útav, hvørjar uppgávur talan er um, og síðani mugu vit fara undir tær neyðugu fyrireikingarnar, ið skulu til. Her hugsi eg um starvsfólkatilfeingi, útbúgving og eisini samskifti og samstarv millum Landssjúkrahúsið, Nærverkið og millum øki innanhýsis, sigur Mary J. í Garði.

## Samstarva ikki upp á tvørs

Stjórin í Nærverkinum sigur, at samstarvið við Landssjúkrahúsið í dag um útskrivingarmannagongdir er gott. Til dømis í sambandi við at tryggja, at viðurskiftini í heiminum við eitt nú hjálpitólum og heimarøkt eru fingin í lag.

Tað eru leiðslurnar, ið kunnu taka stig til at menna og skapa ymisk samstørv, men leiðslurnar einsamallar kunnu ikki samstarva uppá tvørs. Hetta krevur semju millum økini um at royna eitthvørt tiltak saman.

Sjálv vil Mary J. í Garði fegin royna nýggjar leiðir innan samanhangandi sjúklingagongd, og hon hevur eisini hugsa um, hvussu ein byrjan á hesum øki kundi sæð út.

– Ambitiónin má vera, at sjúklingurin ikki sjálvur kennir sektormørkini ella økis-skilnaðin millum sjúkrahús og heimatænastuna, sigur Mary J. í Garði.

- Eitt nú kundu vit saman sett verkætlanir í gongd, har vit tóku ymiskar málbólkar í senn, ið frammanundan finnast sum bólkar. Vit kundu arbeitt tvørgangandi í hesum málum. Men tað er umráðandi eisini at fáa Almannastovuna við, tí praktiskar fyriskipanir mugu til. Um Landssjúkrahúsið, Heimatænastan – sum er ein partur av Nærverkinum – og Almannastovan arbeiddu saman tvørgangandi um somu bólkar, so skuldi verið møguligt hjá sjúklinginum at kent eina samanhangandi gongd, har bæði sjúklingar og avvarandi vórðu spard fyri sjálvi at skula stríðast yvir um hesi mørkini, sigur Mary J. í Garði.

Høvuðsendamálið við heimatænastuni er at geva borgarum praktiska og persónliga hjálp til at vera heima sum longst, ið er nakað sum er umráðandi fyri flestu borgarar. Heimatænastan tekur sær av borgarum yvir 67 ár, men eisini av varandi sjúkum ella álvarsligum sjúkum, sum til dømis krabbameinssjúklingum. Í dag kunnu serliga sjúkir krabbameinssjúklingar fáa opnan innleggingarseðil, og hetta hjálpur heilt nógv upp á tryggleikan. Serliga tá ongin náttartænasta er í løtuni og at sjúklingar, sum eru heimabúgvandi, eru heilt einsamallir millum kl. 23.00 og kl. 08.00.
Aðrir sjúklingar fáa ikki opnan innlegginarseðil.

